### Minningarorð um ommu mína

# Kristinu Sofíu Ferjá

### (Dinnufíu) frá Gjógv
### fødd 15. apríl 1917 - deyð 8. sept. 2008

Jesus vælsigni tykkum, vóru altíð fyrstu orðini, omma segði, tá ið vit komu at vitja, so fevndi hon børnini og gav teimum ein koss á kjálkan. Nú er omma farin heim til teir ævigu bústaðir, einans eitt knapt ár eftir, at abbi fór. Árini vóru mong, so omma mundi vita hvønn veg tað bar, tá ið hon fyri stuttum legðist í songina.

Sum smádrongur var eg nógv norðuri við Gjógv og ferðaðist. Kúgvin stóð í kjallaranum. Eg plagdi at hyggja at, tá omma mjólkaði kúnni. Eg minnist, hvussu reina eg helt mjólkina vera. Kúgvin var so rikin út í hagan um morgunin og heim aftur um kvøldið. Omma var ikki so nógv at síggja úti í bygdini, oftast sást hon fara til handils ella eystur til Trinommu. Sunnudagar fór hon í kirkju.

Tað var ikki altíð stuttligt at koyra til Gjáar. Tað kundi vera nógvur kavi og nógvur vindur. Abbi plagdi mangan at minna meg á, tá ið tað var ivaveður, hvussu glaður eg var, tá omma kom í bilin, tí tá kundi veðrið leika í, sum tað vildi, tá var bilurin tryggur. Tá kundi omma tala at, men samstundis smíltist hon.

Tá ið fjøllini vórðu gingin, plagdi omma at koma á rættina við drekka og pannikøkum. Tá seyðurin var fingin heim og flettur, vóru vemburnar bornar oman á áarbakkan, har omma vaskaði tær. Garnmørarnir vóru reinsaðir, hongdir upp og seinni gjørdir til góða garnatálg. Tá ið flettingin var fingin frá hondini, vórðu rullupylsur seymaðar og blóðpylsa gjørd. Omma gjørdi eisini altíð kjølpylsu. Tá skuldi einki fara burtur, men alt skuldi koma til høldar.



*Jógvan Sofus og Dinnafía*

Á jólum, tá jólagávurnar lógu undir trænum, vóru altíð tveir bleytir pakkar. Tað vóru pakkarnir frá Gjógv og av Eiði. Ommurnar báðar vóru óførar at binda. Oftast vóru hálvhosir í pakkanum, men eisini kundi tað vera føroysk undirklæði ella einir vøttir.

Omma mintist framúr væl. Hon visti so nógv um familju sum fáur, ikki bara um okkara egnu ætt, men víða um í landinum. Stuttligt var at spyrja hana um dagar, nøvn og árstøl, svarið hevði hon beinanvegin. Eingin telda var kvikari. Hóast hon visti so nógv, gjørdi hon einki hóvasták burturúr sær. Tá fólk komu saman til brúdleyp, føðingardagar ella veitslur, var tað altíð abbi, ið hevði orðið, hon sat og lýddi á, men var okkurt, sum abbi ikki visti ella ivaðist í, gav hon honum altíð eina hjálpandi hond.

Saknurin var stórur, tá ið abbi doyði. Hóast børn, ommubørn og langommubørn mangan vóru og vitjaðu hona, var tað altíð eitt tómrum eftir abba.

Tíðarskeiðið hjá ommu er runnið. Aftur standa eini hús við Gjógv tóm. Eingin hyggur í vindeyganum, eingin standur á trappuni og ynskir vælkomin, og eingin stendur í túninum og veittrar farvæl.

25. september í ár høvdu verið tvey ár síðani omma og abbi fluttu á Mørkina í Streymnesi at búgva. Teimum dámdi væl har, og tey høvdu tað gott.

Omma, eg fari at takka tær fyri alt, tú hevur verið fyri meg og konu mína, men ikki mist børn okkara. Mong ár eru liðin, men mínar barnadagar við Gjógv hjá ommu og abba og mínar barnadagar hjá ommu og abba á Eiði fari eg ongantíð at gloyma.

Tit vóru bæði fødd við Gjógv og vuksu upp har í hesi vøkru bygd. Sum hjún livdu tit eitt langt og eydnurík lív saman, í næstan sjeyti ár. Nú hvíla tit undir grønum flagi, lið um lið, mett av døgum, í tykkara heimbygd, sum tit vóru so góð við.

Vit liva øll í vónini um, at vit ein dag síggjast aftur.

Takk fyri alt.

**Jógvan**

# Faroe Islands Gathering

**Undir heitinum Faroe Islands Gathering skipaði Harley-Davidson Club Føroyar í síðstu viku fyri einum túri í Føroyum fyri motorsúkkluáhugað úr Danmark, Svøríki og Norra**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Mánadagin í síðstu kom eitt ferðalag við motorsúkklum við Norrønu. Tað var Harley-Davidson Club Føroyar, sum skipaði fyri einum túri í Føroyum fyri motorsúkkluáhugað úr Danmark, Svøríki og Norra.

Navnið á hesum tiltaki er Faroe Islands Gathering, og endamálið er m.a. at vísa motorsúkkluáhugaðum uttanlands møguleikarnar fyri at motorsúkklukoyring í Føroyum.

Í sambandi við vitjanina var tíðindafundur hjá Harley Davidson í Jónas Broncksgøtu, sama dagin sum tey komu. Greitt var frá vitjanini og ein skrá, sum var gjørd fyri túrin.

Ferðalagið vitjaði í Eysturoy, Norðoyggjum og í Vágum. Eisini vitjaðu tey í felagshølunum hjá Føroya Ellisakførum.

Vitjanin í Føroyum var frá mánadegnum 15. til hósdagin 18. september, tá ferðalagið fór av stað aftur við Norrønu.

Fyrireikarar er væl nøgdir við túrin og við at veðrið eisini var til vildar. Formaður í Harley-Davidson Club Føroyar er Heini Restorff.






## Andlát og jarðarferðir

**Sofía Kastalag Risager**, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Vindeby á Taasinge, andaðist á Svendborg sjúkrahúsi sunnudagin 21. september, 77 ára gomul.

**Fritleif Jacobsen**, ættaður úr Vági, búsitandi í Marstal, andaðist sunnudagin 21. september, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13 frá Marstal kirkegårdskapell.

**Thomina Vang Hansen**, vanliga nevnd Mina, úr Nólsoy, andaðist á Landssjúkrahúsinum 20. september, 94 ára gomul.

**Hans Olsen úr Sørvági** andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 21. september, 83 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Hans kunnu lata Sørvágs kirkju eina gávu.

## Ræði ráa

*Mong eru neyðaróp*
*í deyðs heildar vulkanska díki*
*men ongin hoyrir petti,*
*tí eru so upptikin*
*av sjálvum sær*
*ja, av at gera kvetti.*

*Ein og hvør*
*er sær sjálvum næstur*
*vil orðatak vera við,*
*men neyðstødd gera*
*enda á sínum pínum*
*at leggjast í gravar frið.*

*Øll trúgva okkurt*
*so prestar trúgva*
*fult og fast upp á blekk,*
*meðan ateistar*
*trúgva upp á anti-blekk*
*og hitt naiva blaka vekk.*

*Men at trúgva*
*upp á seg sjálv*
*skal valdast við vurder,*
*tí oyggja molarnir Føroyar*
*ikki júst nakað land*
*í verðini er.*

*Kortini hava Føroyar*
*eitt sjálvmorðs procent*
*sum er skríggjandi høgt,*
*at bóru nú oyggjar millión*
*fólk vóru forger*
*tjúgu procentini snøgt.*

**Hallur Andreasen**

**Dagurin**
**24. september. Tekla,** deyð umleið ár 100. Hevði hoyrt ápostulin Paulus prædika og varð umvend. Hóast hon var illa forfylgd, slapp hon undan hvørja ferð og doyði friðarliga 90 ára gomul.